# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Fritzl-málið er ein vanlukka fyri Eysturríki. Eg vóni, at EM í fótbólti kann bjarga umdømi okkara*

*Alfred Gusenbauer, kanslari*

# Avgerðin kann fella í dag

**Vinnur Barrack Obama valið í Oregon í nátt, kann hann tryggja sær uppstillingina hjá demokratunum**

Teir flestu eygleiðararnir halda, at Barrack Obama er sannførdur um, at hann fer at tryggja sær teir seinastu neyðugu valmenninar á uppstillingarvalunum í statunum Oregon og Kentucky í nátt, men at hann torir ikki at siga tað alment.

Sum er tørvar Barrack Obama bara 17 valmenn afturat fyri at tryggja sær tann neyðuga meirilutan av valmonnunum. Meiningakanningarnar undan valunum í nátt vísa, at Obama fer at vinna í Oregon, meðan Hillary Clinton fer at vinna í Kentucky.

- 20. mai kunngera vit, hvør hevur vunnið uppstillingina, segði ein talsmaður hjá Barrack Obama herfyri, men tað er ikki vist, at Obama fer at lýsa seg sum vinnara, hóast hann fær nóg mikið av valmonnum í nátt. Eygleiðarar siga, at ger hann tað, kann tað fáa veljarar hjá Hillary Clinton at venda honum bakið. Nógvir Clinton-veljarar hava sagt, at teir fara heldur at sita við hús valdagin ella at atkvøða fyri John McCain heldur enn at atkvøða fyri Obama.

- Hjá Barrack Obama ræður um at stíga varisligа nú, tí nú ræður um at savna demokratiska flokkin til dystin við republikanararnar í heyst, sigur Brian Vargus, professari á Indiana University við NTB.



*Vinnur Barrack Obama annað valið í nátt, hevur hann vunnið meirilutan av valmonnunum*
*Mynd: Polfoto*

# Suðurafrika sum í apartheid-tíðini

**Fremmandahatur í Suðurafrika hevur elvt til viðurskifti, sum minna um apartheid-dagarnar**

Ein byglja av harðskapi herjar fleiri suðurafrikanskar býir í hesum døgum, har eirindaleys harkalið jagstra fólk, sum eru komin úr øðrum londum. Tey fremmandu, sum serliga eru úr Zimbabwe, Malawi og Mosambik, fáa skyldina av tí stóra arbeiðsloysinum, sum Suðurafrika stríðist við.

Tey fremmandu verða álopin og bukað, og altjóða tíðindastovurnar vita eisini at siga frá tilburðum, har álopsmenninir hava sett eld á fremmandafólk mitt á gøtuni. Myndugleikarnir siga, at 22 fólk hava latið lív í áganginum, og felagsskapurin Læknar uttan Landamark metir, at umleið 6.000 fólk eru flýdd undan harðskapinum.

Tað er serliga í Johannesburg, at tey fremmandu eru fyri ágangi. Løgreglan har sigur við BBC, at umleið 200 fólk eru tikin og skuldsett fyri harðskap. Løgreglan hevur fleiri ferðir skotið við gummikúlum eftir álopsmonnum.

### Sum apartheid

Nógvir suðurafrikanar siga, at tilburðirnir minna ikki sørt um tað, sum hendi undir tí harðrenda og rasistiska apartheid-stýrinum, sum endaði fyri 14 árum síðani. Ágangurin ímóti teimum fremmandu kemur eisini stjórnarflokkinum ANC sera illa við, tí fleiri av leiðarunum í flokkinum flýddu til júst Zimbabwe, Malawi og Mosambik undan apratheid-stýrinum.

Formaðurin í ANC, Jacob Zuma, hevur roynt at sissa fólk. Hann sigur við BBC, at Suðurafrika skal ikki vera kent fyri fremmandahatur.



*Álopsmenn settu eld á hendan mannin á gøtuni í Johannesburg, men tað eydnaðist løgregluni at sløkkja eldin*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Mugabe fekk vápnini

Tað eydnaðist kortini zimbabwisku myndugleikunum at fáa fatur á teimum vápnunum, sum teir høvdu bílagt úr Kina, men sum suðurafrikonsku myndugleikarnir sýttu fyri at flyta um markið. Vápnini komu við einum kinesiskum farmaskipi til havnarbýin Durban í Suðurafrika, men myndugleikarnir sýttu skipinum at leggja farmin upp. Skipið fór síðani til Kongo, og har bleiv farmurin lossaður og síðani fluttur við flogførum til Zimbabwe. Sambært Reuters var talan um 77 tons av lóðuri, granatum og rakettum. Fleiri lond hava funnist at zimbabwiska stýrinum, tí tað keypir vápn, samstundis sum er trot er á mati, vatni, brennievni og øðrum neyðsynjarvørum í landinum.

### Banna tyssibumbum

Umboð fyri meiri enn hundrað lond fundast í hesum døgum í írska høvuðsstaðnum Dublin, har tey umrøða eitt uppskot um at banna teimum sokallaðu tyssibumbunum. Benedikt pávi hevur heitt á londini um at finna eina semju, men eygleiðarar vísa á, at USA, Kina, Russland og Ísrael, sum keypa tær flestu tyssibumburnar, eru ikki við í Dublin.

Aðalstjórin í altjóða Reyða Krossi, Jakob Kellenberger, sigur við BBC, at tyssibumbur eru eitt sera andstyggiligt vápn. Í teimum eru fleiri smáar spreingiloðingar, sum verða spjaddar um eitt stórt økið, og sum bresta, tá onkur kemur at teimum. Tað ger, at løðingarnar kunnu liggja leingi og ofta langt eftir, at eitt kríggj er liðugt.



*Jakob Kellenberger er aðalstjóri í altjóða Reyða Krossi*
*Mynd: Polfoto*